# BØNARLØTAN

**FEBRUAR** **2024** **39. árg.**




***1. Hósdagur*** ***Sálm 119.93-112***

### Atlantic Mission, Juvel II

Vit takka Gudi fyri, at nógv hava teknað seg at koma við. Enn er pláss fyri fleiri. Seinasta freist at tekna seg er 18. februar. Nógvar fyrireikingar eru og nógv, ið skal fáast uppá pláss. Biðið um, at alt verður til reiðar, tá ið øll tiltøkini fara í gongd í Randers um páskirnar.

## KRINGVARPIÐ

4. feb. kl. 17 útvarpsmøti, Berøa, Runavík
25. feb. kl. 16 sjónvarpsmøti, Siloa, Fuglafjørður
25. feb. sjónvarpsandakt, Beinta Áargarð

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)

Sunnukv. kl. 21.00.. Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00...... Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Fríggjadagur* *Matt. 7.15-29*

### Elam Ministries, Evropa
### Margretha Højgaard Poulsen

1. feb. byrjar fyrsta net-skeiðið av trimum í ár. Samkomur og einstaklingar úr fleiri londum í Evropa taka lut. Takk fyri forbønir tykkara.

### OM, LOGOS HOPE, TeenStreet



2-3. feb. verður Mini TeenStreet á Kambsdali. Josh og Debs tala um evnið *Saman*. Tilmelding nú opin til TeenStreet og TiM/summartoymi. Rakul Feilberg Zachariasen úr Hoyvík er í Póllandi, og toymi við Jóhan Petur Johannesen á odda fer eisini hagar 11-17. feb. Tey luttaka í arbeiði við ukrainskum flóttum, sum OM í Póllandi skipar fyri í Warszawa. Heidi N. Jacobsen, Alice og Jaspur Tausen og børn teirra eru umborð á Logos Hope í Suðurafrika. Doulos Hope er í Filipsoyggjum, haðani skiparin Jón Helmsdal kom heim 25. jan. Biðið fyri TeenStreet, teimum í Póllandi og teimum, sum sigla við OM-skipunum.

## *3. Leygardagur* *5. Mós. 9.15-29*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**

Harrin hevur signað, síðani vit byrjaðu á Malta í juni 2023. Nøkur nýggj donsk børn ganga nú í sunnudagsskúlanum. Ansa er framvegis sjúk og er í viðgerð fyri Morbus Chrone síðani sept. Biðið fyri sunnudagsskúlanum og fyri Ansu.

**Anna og Hans Djurhuus**

Føroyskt møti verður 3. feb. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2A, Aalborg. Møtið á Malta, sunnukv. 4. feb. kl. 18, verður á donskum. Fleiri danir koma til hetta møtið. Biðið, at vit eisini náa danir við evangeliinum á møtunum í Aalborg og á Malta.

**ZAREPTA**

Biðið fyri samkomulegunum.

## *4. Sunnudagur* *Lukas 15.1-19*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 10**



Tvey stór tiltøk verða tíðliga í feb. Biðið fyri fyrireikingunum, og at tiltøkini verða til signing fyri luttakararnar. Vit vóna, at Eli finnur eitt gott, andaligt heim í Hollandi.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

Vit fara skjótt úr USA til Bretlands at vitja familju og vinir. Biðið

fyri okkum, og at Noah fær heilsubót. Hann hevur fingið tríggjar skurðviðgerðir seinasta árið, men stríðist enn við tinnitus og niðursettari hoyrn. Vit gleða okkum at fara aftur til PNG í apríl/mai at halda fram í tænastuni.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12**
**– Synnøve og Danjal av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 3**

## *5. Mánadagur* *Es. 41.1-29*

**ONGLAND, Taunton, European Christian Mission (ECM)**
**Dorit og Simon Marshall**



5-10. feb. undirvísir Simon í Týsklandi, har nýggir ECM-trúboðarar luttaka. 18-24. feb. hittist ECM-leiðslan til fundir í Týsklandi. 28-29. feb. skal Simon á stevnu fyri forstjórar (Chief Executive Officers). Vónandi verður nakað minni ferðing hetta árið.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

## *6. Týsdagur* *Lukas 15.20-32*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 16, Jónatan 14,**
**Markus 11, Evita 8, Joy 7**
Biðið fyri barnaklubbanum, sum er hvønn leygard. her í Puruándiro

og í einum grannabýi. Nógv foreldur loyva ikki børnunum at luttaka, tí tað eru kristin, ið skipa fyri. Harrin gevi okkum náði at bera góðan vitnisburð, har vit fara, og at foreldrini lata børn síni luttaka.

## *7. Mikudagur* *Es. 42.1-25*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**



Poul vitjar samkomuna í Sorimi fram til 14. feb. Eg rættlesi Nýggja Testamenti saman við teimum trúgvandi. Biðið fyri góðari heilsu og nógvum møguleikum at uppbyggja tey í Orði Guds.

## *8. Hósdagur* *Sálm. 119.113-135*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**



Vit fyrireika næsta stigið og túrin til Pakistan. STEVN er virkið. Vit hava skeið og framløgur, eisini á netinum. Biðið, at Harrin varðveitir, gevur vísdóm, góða heilsu og áræði.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 0**

## *9. Fríggjadagur* *Lukas 16.1-13*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit arbeiða eftir nýggjari skrá fram til summarið. Vit takka fyri møguleikarnar, ið Harrin gevur okkum her.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 6**

## *10. Leygardagur* *Es. 43.1-28*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Heilsustøðan er nú sera góð eftir hjartaskurðviðgerðina hjá Peturi síðst í aug. Í feb. verða vit heima allan mánaðin, men møtast regluliga á netinum við trúboðarum kring heimin. Vit fyrireika eisini fundir í mars um trygd hjá trúboðarum.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 8, Natan 5**

## *11. Sunnudagur* *Lukas 16.14-31*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Bíbliuumsetingin gongur væl, og vit fyrireika longu næsta pro-

sjekt, sum helst verður í okt. Vit skulu m.a. avgera, hvørjari bók í Nýggja Testamenti vit skulu arbeiða við. Biðið fyri okkum.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Biðið, at eisini nøkur ung fáa hug at koma saman um Guds Orð á hjartamálinum.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Mánadagur* *Es. 44.1-12*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Nevndin í *Vinir Jesusar* hittist fyrst í feb. í Onesimusar húsi at leggja næstu seks mánaðirnar til rættis fyri venjingarvirksemi og at røkka út. Tey biðja eisini um fígging til at byggja eina hædd afturat. Augustin og Hillebrand arbeiða við fyrireiking og útgávu av pørtum av Bíbliuni. Vit ynskja at vera til signing fyri onnur við, men orkan røkkur ikki til.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 13**



Handbókin *Personal Support Matters* er prentað, og kristnir felagsskapir verða kunnaðir um hana. Biðið, at rætti málbólkurin frættir um handbókina.

## 13. Týsdagur *Lukas 17.1-21*

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**



Takk fyri allan stuðul í 2023. Vit vitja samkomur gjøgnum veturin at greiða frá arbeiðnum og ætlanum fyri summarið. Biðið, at nógv verða tøk at manna skipið sum sendiboð Kristusar, og at menniskju koma til trúgv. Vit sigla av Klaksvík til Nuuk 22. mai, har vit luttaka nakrar dagar í tiltaki saman við samkomuni har.

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Juvel, flutningsbáturin í Harrans verki í Suðurgrønlandi gjøgnum 22 ár, verður nú umvældur í Kollafirði. Ymiskt arbeiði skal gerast, serliga at pussa skrokkin. Øll hjálp er kærkomin. Áhugað kunnu venda sær til Gordon M. Midjord á 595900 ella Jóanes Norðberg á 222909. Vónandi verður arbeiðið liðugt til páskir, so Juvel kann royndarsiglast og fara yvir aftur *sum nýggjur* mánaðarskiftið apríl/mai.

## 14. Mikudagur *Es. 44.13-28*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Nakkaskurðviðgerðin hjá Daniel í des. gekk væl, og truplasta tíðin er farin. Hann skal tó ikki lyfta meiri enn 5 kg fram til fyrst í mars. Bíbliutímar yvir video til Qasigiannguit byrja aftur í feb. Biðið fyri framhaldandi leking og fyri teimum í Qasigiannguit.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



Vit fegnast um, at Jesper Johannesen, 58 ára gamal dani, varð doyptur 17. januar. Hetta er fyrsti dópur í nýggja salinum.

*Í dag fyllir Aron Joensen 12 ár

## *15. Hósdagur* *Sálm. 119.136-153*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Møtini eru sunnud. kl. 11 og fríggjakv. kl. 20. Biðið fyri mongu barnafamiljunum í samkomuni og fyri sunnudagsskúlanum; fyri húsbólkunum og teimum, sum leiða; fyri teimum nýggju lesandi, at tey verða varðveitt í trúnni; og um, at góði trivnaðurin í samkomuni heldur fram!

**– Susan og Øssur Berghamar**

**FØROYAR**



**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## *16. Fríggjadagur* *Lukas 17.22-37*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4**
Biðið fyri restini av viðgongutíðini, og at tað skal ganga væl at føða. Starvsfelagarnir í Kovol halda fram at arbeiða við teimum, ið læra mál og mentan. Í grannabygd, bert 1½ tíma frá okkum, vórðu tvey fólk skotin í stríði um jørð. Ongin løgregla er í nánd. Biðið, at trætan verður loyst friðarliga.

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
1. januar fór eg frá sum leiðari fyri Atlantic Mission. Páll á Lakjuni hevur tikið við. Eri tó framvegis í leiðsluni og verði partur av AM-tiltakinum í Randers á páskum. Evangeliska tænastan og vitjanartænastan eru hjartamál okkara.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 15, Terji 11, Petra 10**

## *17. Leygardagur* *Es. 45.1-25*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Biðið um vísdóm og Guds hjálp, nú vit møta broytingum og avbjóðingum í nýggja árinum. Ivor er upptikin av útbyggingini av samkomubygninginum.

## 18. Sunnudagur — *Lukas 18.1-17*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 7**

Sum samkoma byrjaðu vit okkara fyrsta ungdómsbólk fyri fýra árum síðani, og í 2024 byrja vit eisini ein annan umgdómsbólk fyri yngri ung (11-15 ár). Biðið, at Gud frelsir og varðveitir hesar ungu sálir!

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

Solomon hevur nú tveir elstar aftrat sær – hetta er bønarsvar. Sunnudagsskúlin veksur; biðið, at vit fáa fleiri sunnudagsskúlalærarar umframt leiðarar til húsbólkar. Takk fyri forbøn.

## 19. Mánadagur — *Es. 46.1-13*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Hvørja viku eru um 500 nýggj fólk, ið fegin vilja fáa pakka við Nýggja Testamenti, bóklinginum *Beyond religion* og spurnarblað. Vit eru í farloyvi í Onglandi, m.a. fyri at søkja Guds leiðslu víðari í arbeiðnum við turkum, nú vit hava verið har í yvir 20 ár.

## 20. Týsdagur — *Lukas 18.18-43*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Sue er liðug við kemoviðgerð fyri sjáldsama krabbasjúku og kom aftur til Meksiko síðst í januar. Eg fari til Skotlands 22. februar. Biðið um trygga ferð, fyri Sue, Mixtec-toyminum, og at nakrar verkætlanir verða lidnar, áðrenn eg fari.

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 3, Selah Rose 1**
Vit ferðast og kunna nógvar samkomur um okkara tænastu. Biðið fyri trygdini, um neyðuga hvíld, og at vit verða styrkt, tá ið vit fara aftur til Indonesia í mai.

## *21. Mikudagur* *Es. 47.1-15*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 10, Abigail 5**
Vit gleða okkum til avbjóðingar í nýggja árinum. Seinastu vikurnar hava verið tungar, og vit hava verið mótleys og vónbrotin – men Gud er trúfastur! Biðið fyri okkum, fyri arbeiðnum at stovna nýggja samkomu, og at fólk verða tøk at arbeiða har.

## *22. Hósdagur* *Sálm. 119.154-176*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**
Wina hevur verið hjá nógvum læknum, nú hon hevur havt nógva pínu síðstu vikurnar. Biðið um grøðing. Bilurin hevur eisini argað síðstu mánaðirnar, men tykist nú virka væl.

## *23. Fríggjadagur* *Lukas 19.1-27*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit gera klárt til at fara til Filipsoyggjar í mars. Eg arbeiði við rættlestri av fleiri bókum, bæði í Gamla og Nýggja Testamenti.



**Nótabókin til NSGF**

Nótabókin, sum Óli Nicodemussen ger fyri Sálmabókagrunnin, er um at vera liðug. Bind 2 kom í heyst og bind 3 væntast til páskir.

## *24. Leygardagur* *Es. 48.1-22*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0**

Parið, ið vit skulu arbeiða saman við, kemur aftur úr farloyvi. Vit skulu vitja ættarbólkin, sum vit kanska skulu flyta inn til. Biðið, at vit standa føst saman við Gudi og tæna við styrki frá honum og ikki í egnari styrki, tí so møðast vit skjótt.

## *25. Sunnudagur* *Lukas 19.28-48*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**

Tjóðartingsval er 25. feb. Nógvur ófriður var um eitt av valevnunum hjá andstøðuni fyri nøkrum mánaðum síðani, og tað er óvist, hvussu úrslitið verður. Sitandi forsetin kann ikki stilla upp aftur. Biðið fyri valinum, og at vit kunnu liva trygg.

## *26. Mánadagur* *Es. 49.1-26*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Eg og ungi umsetarin rættlesa í løtuni Nýggja Testamenti. Tað er ein frægd at síggja, hvussu nógv hann hevur ment seg, síðani hann byrjaði at umseta. Hann ger eisini kladduna til Dómarabókina. 7. jan. fingu hann og konan eina dóttur. Timburmaðurin er nú byrjaður upp á húsini hjá mær í Porkeri. Biðið, at alt gongur væl í hond.

*Í dag fyllir Selah Rose Hansen 1 ár
*Í dag fyllir Elizabeth Niclasen 18 ár

## *27. Týsdagur* *Lukas 20.1-26*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Tað er nógv myrkur í hesum heimi. Men Jesus er ljós heimsins (Jóh. 8:12) og Hann segði eisini, at vit eru ljós fyri Hann (Matt. 5:14). Tað er okkara ábyrgd, at børn og ung síggja ljósið og hoyra orð krossins.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**
Yanomamifólkið norðanfyri er hart rakt av malaria. 85 eru deyð eftir stuttari tíð. Vit kenna nøkur teirra. Hjálparmaður og eg hava í tríggjar mánaðir umvælt næmingaheimið. Vit eru takksom fyri hjálpina.

*Í dag fyllir Rebekah Niclasen 16 ár

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Liz hevur nógva pínu í lærinum og dettur ofta. Onki bein er brotið, men læknar duga ikki at siga, hví hetta er so. Hetta hevur órógvað vanligu ætlanir okkara. Vit vóru tvær vikur í Nayba og gjøgnumgingu tilfarið til fýra teir fyrstu kap. í Rómbrævinum. Umstøðurnar eru óstøðugar, men eg haldi fram at skriva tilfar, tá tað liggur fyri. Takk, at tit biðja fyri okkum í verkinum her.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 12, Louie 10, Rio 4**

Í fjør, tá eldru børnini fóru í framhaldsdeild, helt eldri ensktflokkurin uppat. Nú hugsa vit at byrja ein nýggjan flokk fyri yngri børn. Biðið um vísdóm og Guds leiðslu.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp, Hanna 15**

Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**Bileam og líknilsi hansara (2018)**
**103 síður 140 kr.**

Vit hitta Bileam, Profetin við Stórá. Høvundurin reisir avbjóðandi spurningar um Gud og um Guds atferð og avgerðir. Ein álvarslig ávaring um ikki at lata seg fanga av villu Bileams og læru hansara. Páll Róland Poulsen týddi til føroyskt.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo